## Vár við lýggjum vindi, ver vælkomið nú

Hendan tekstin kunnu vit seta í samband við kvøldskúlaframsýningina, sum ár undan ári býur okkum inn og náttúruni út. Várið ver vælkomið.

Trivnaðargrundarlagið hjá okkum menniskjum er bygt á skapanarverkið og tað at skapa. Og hyggja vit inn á heimasíðuna hjá Klaksvíkar kvøldskúla ivast ein ikki. Litir og greinar av alskyns slagi, helst lættari at síggja hvat ikki verður útboðið, ella sum onkur vildi sagt, har manglar bara livandi grind.

Í Føroyum hava vit altíð uppalt fólk til gott handaligt arbeiði; alt frá smiðjum til seymikonur. Helst er hetta komið av teimum umstøðum, vit eru vaksin upp undir. Fátæksligt, við lítið av peningi, lítið av tilfari, og lítið og onki samband við umheimin. Men vit hava livað tætt saman sum familjur og grannar, og tí hava vit lært hvør av øðrum. Men tíðirnar eru broyttar. Og tá vit nú, ikki í sama mun fáa handverkið í vøggugávu, er tað gott og viðkomandi, at vit bjóða tær lista- og handverksgreinar út, sum Klaksvíkar kvøldskúli hevur. Í dag kunnu vit lættligari keypa okkum tað okkum tørva, og heimurin er lættari atkomuligur. Men sjálvt um umstøðurnar eru heilt aðrar, enn tær vóru hjá okkara forfedrum, so hava vit tørv á at skapa. Skapa og virka til gleði og trivnað hjá okkum øllum.

Tá ið eg hyggi inn á síðuna hjá Klaksvíkar kvøldskúla, er nógv at velja ímillum. Okkurt er meira siðbundið enn annað, men eisini er okkurt nýtt at síggja. Ringt er at nevna okkurt úr rúgvuni, men nú flest allar ommur ikki sita á bríkini men heldur íðka og renna í frítíðini, er tað gott at síggja, at børn og ung kunnu læra at binda. Nakað, sum vit føroyingar hava gjørt meira enn aðrastaðni. Tilboðini spenna so víða sum farva og garva, VHF radioskeið, pardansur, matgerð fyri menn, seyma føroyskan vest, føroyskt fyri tilflytarar og ikki minst vælvera, vatn-pilates, saunagos og mangt annað.

Tað vakra hugtekur øll, syngja vit. Í dag fáa vit møguleika at síggja tað skapandi handverkið. Alt tað vakra og litríka verður sett í perspektiv og blívur veruligt. Litir og skap tosa søk teirra skapandi og eru ein stórur partur av okkara nútíðar mentan. Hvør fuglur letur við sínum nevi, og tað er tað, sum er mest gevandi og best fyri allar luttakarar. Øll hugtaka tit okkum hvør á sín hátt.

Er tað nakað, vit ikki skulu gera, so er tað at steðga upp. Heldur eiga vit at steðga á, og er tað tað, sum kvøldskúlin nú ger. Tit fara í eina summarhvíld fyri at løða upp og styrkja sansirnar. At síggja okkara vakra land við várinum í hond, har Kjølur og Klakkur stimbra og eggja til nærveru og samanhald, leggja lunnar undir eina hugaliga tíð fyri framman,  har vit savnast og gleðast saman, geva pláss fyri hvør øðrum, heilt frá tí lítla til tað stóra, tí øll skulu vit liva og trívast her.

At enda vil eg takka tykkum øllum eldsálum, tykkum, sum vilja hetta so nógv, og geva okkara samfelag nakað so dýrabart sum ta skapandi listina, takk og aftur takk.

Fólkaheilsustýrið fór undir ABC fyri sálarheilsu við einum slagorði, sum hóskar væl til kvøldskúlavirksemi, og skal hetta vera mín síðsta heilsan til tykkum her á Skúlatrøð:

Ver virkin, ver saman, ver hugbundin.

*Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen*

